# Klaksvíkar Sjómansskúli

## e n rk n k

Í august 2001 byrja   hesi skeið:

**HEIMASKIPARAR:**
Útbúgvingin til heimaskipara varðar í 1ár. Upptøkutreytir til heimaskiparar er treytað av víðkaðari fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskt, danskt, enskt, rokning/støddfrøði, alis-evnafrøði við próvtali í minsta lagi 6 ella javnmett hægri prógv. Ella hevur gingið á sjóvinnuskúla og staðið dugnaskaparskeið í sigling.
Kravda siglingartíð til heimaskipara er 12 mánaðar, herav skulu 6 mánaðar við fiskiskipi yvir 20 t.

Við framhaldandi lestur í $^{1}/_{2}$ ár afturat kann takast prógv sum skipari.

**SJÓVINNUFLOKKUR:**
Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til heimaskipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verður eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjórðingar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar  20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn í sjóvinnuflokkin. Enn eru pláss eftir.

**SKIPSKOKKASKEIÐ:**
Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og einføri, at proviantera, matgera, baka og borðreiða.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar í 20 vikur. Skeiðið, ið byrjar í august 2001, er fullteknað.

**Seinasta freist at tekna seg til hesi skeið er 01. juni 2001.**

all that rain
the naked truth




í sølubúðum kring landið

3 árin

Kr. 159,-

## Motorpassara-útbúgving

Treytað av nóg stórari luttøku byrjar undirvísingin 6. august 2001.

Umsøkjarar við viðkomandi yrkisútbúgving kunnu byrja seinni, 3. september.

Skeiðið er liðugt 21. desember 2001.

Treytirnar fyri upptøku eru:
- at ein hevur fylt 18 ár og annahvørt
- hevur staðið yrkisskeið á góðkendum sjóvinnuskúla ella
- hevur havt maskintænastu við fiski- ella farmaskipi á 20 tons ella meira í 12 mánaðir.

Meiri fæst at vita um m.a. innivist og stuðulsmøguleikar á telefon nr. 456311.

Skrivlig umsókn skal sendast Tekniska Skúla í Klaksvík, Postboks 20, 700 Klaksvík í seinasta lagi 15. juli 2001.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Telefon nr. 45 63 11 Telefax nr. 45 73 11

Nógv leikutøj til børnini



ALFA BÓKAHANDIL
N. Pálsgøta 2 · 700 Klaksvík · Tlf. 455339

## Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin



ALT TIL HANSARA




J.A.P. N. Pálsgøta 6 · 700 Klaksvík
Tlf. 456880 · Fax 456887

Alt innan Bilar



Øllum verður ynskt eina góða Norðoyastevnu

Bil & Dekkverkstaðið
Oman Eið · 700 Klaksvík · Tlf. 456959 · Fax 457175

Nógv nýggj vøra heimkomin



Benetton taskur

Benetton parfumur

Nýggi summarlukturin frá

Escada



ESCADA
TROPICAL PUNCH

Tropical Punch

Dolce & Gabbana

Hjá Annu Vágstún 2 · 700 Klaksvík · Tlf. 455238

# Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll,
ið gleddu okkum á 50 ára
stovningardegnum 1. mai.
Takk fyri blomur, gávur
og telefonuppringingar.

Ein serstøk tøkk til
Kl. Hornorkestur og 17 Sangarar
ið gjørdu dagin ógloymandi.

Heilsan

**S/pf Leivur Ellingsgaard**